ER GUD DEYÐUR? Moralska lógin er ikki í fokus fyri tann kristna, men persónurin Jesus, sigur Meinhard Jensen. – At summi kristin halda seg kunna døma eftir lógini er ein onnur søk. Tað er bara spell. Lutherskt er tað ikki, heldur ikki kristið

Tala hins høga

– Stóð tað til mín, skuldu allar rásirnar stemplast fyri ljóðdálking. Mest fyri keðiligan tónleik og yvirvág av ringum tíðindum, sigur Meinhard Jensen

VIÐMERKING

Meinhard Jensen

Seint í február stóð grein í Vikuskiftinum við yvirskriftini Gud er deyður. Jógvan við Keldu hevði nakrar viðmerkingar í eini góðari grein nakað seinni, men eg helt, at nøkur ting skuldu sigast afturat, serliga nú Oddfríður Rasmussen, sum skrivaði greinina, er vorðin formaður í LISA, Listasambandi Føroya, sum fevnir um einar 2000 limir úr níggju feløgum. Oddfríður er frálíkur yrkjari, og tað lesarin merkir á skriving hansara er, at eldur er í sálini. Eisini í greinini Gud er deyður.

Jógvan við Keldu hugsaði sær, at ein rithøvundur fór at sýna innlit í síni skriving. Hetta fekk meg at hugsa um nógvar rithøvundar og teirra innlit í lívsins viðurskifti og ikki minst sína samtíð. Kenslusamar sálir sansa sumt, sum onnur ikki varnast fyrr enn seinni.

Henda grein er skrivað út frá tí hugsan, at greinin Gud er deyður kanska kann lesast sum ein lítil skuggamynd av onkrum ráki í kollektiva føroyska sinninum, sum fjøldin ikki er vorðin tilvitað um enn.

Luther og trúgv

Oddfríður nevndi sjálvur grein sína eitt gleps, og eitt gleps er sjáldan konstruktivt ella gott. Shakespeare skrivaði helst eisini onkuntíð okkurt keðiligt og ódámligt. Kanska lesarabrøv um saniteru viðurskiftini í Stratford. Men lat meg taka greinina í álvara og viðgera hana soleiðis.

Oddfríður setur seg í ta veiku støðu at úttala seg harðliga um tað, sum hann ikki hevur skil fyri. Hann hevur náðiloysi í luthersku trúnni sum eitt høvuðspoint og sigur, hvat Luther heldur um tann, sum stjelur eina gularót: »at hann má... liva við syndabyrðini í allar ævir.« Eg veit ikki, hvat konfirmantar læra hjá presti, men kollveltingin í lívi Luthers, sum hann bygdi trúbótina á, var, at tann, sum trýr á Jesus, er rættvísur fyri Gudi.

Í greinini stendur eisini, at hvørja trúgv tú so hevur trongd til at halda teg til, »so er tað tann ringa samvitskan, sum er drívmegin.« Eg haldi ikki, at hatta passar, og eg rokni heldur ikki við, at nakar sálarfrøðingur hevði tikið undir við tí. Tað er ringur siður at siga seg kenna motivini hjá miljardum av fólkum fyri at fara á knøini uttan at hava nakað at byggja tað á.

Pedagogikkur og gudfrøði

Kanska er tað í skemti, at Oddfríður sigur tað vera ópedagogiskt at prædika, at eitt er rætt og annað skeivt, og at sálin kann glatast, trýrt tú ikki á Gud. Her kann í fysta lagi svaraast, at tað er ein spurningur um gudfrøði og ikki pedagogikk. Í øðrum lagi er tað ikki skilagott at rudda spurningar um rætt og skeivt av vegnum so lættliga. Tað gert tú, tá tú ert trý ár, men síðani gerst tú vaksin.

Kristindómur inniber rætt og skeivt, men tað er ikki øll søgan, tí lívið er ikki at finna í lógini um rætt og skeivt, men í Jesusi Kristi: Lóg Guds kann vísa einum persóni, at hann er á skeivari leið, men tað ber ikki til at frelsa seg sjálvan við at navigera gjøgnum lívið eftir stjørnum, sum siga rætt og skeivt. Lógin fær víst á, at tú maktar ikki at frelsa teg sjálvan, og tí verður hon rópt tyktari. Tað vil siga, at hon tyktar menniskju og fær tey at leita sær skjól hjá Jesusi. Lógin prógvar, at vit eru syndarar, men fær ikki hjálpt okkum sjálv.

Kristin fólk skulu eisini gera rætt og ikki skeivt, men moralska lógin er ikki í fokus fyri tann kristna, men persónurin Jesus. At summi kristin halda seg kunna døma eftir lógini er ein onnur søk. Tað er bara spell. Lutherskt er tað ikki, heldur ikki kristið.

Hetta er ikki fyri at prædika, men fyri at leggja á borðið, hvat kristin trúgv er. Søgan er gomul og ikki íspunnin av føroyskum trúboðarum. Hesum trúðu Milton, Kierkegaard, Dostojevskij, T.S. Eliot, J.R.R. Tolkien, Viderø prestur, og hesum trúðu Móðir Teresa, Martin Luther King og Johan Sebastian Bach. Eisini Bono, Johnny Cash, Emmylou Harris og Bob Dylan. Ikki tí at øll hesi vóru lutheranarar, ella at tey prýða trúnna betur enn onnur, men eg nevni tey sum listafólk og filantropar av teimum frægu. Onnur trúgvandi duga kanska lítið og onki. Eru illa farin. Fáa illa vart seg. Duga illa í skúlanum, duga nóg illa at binda lissur.

Orð

Annað er, at orð verða ikki vigað. Stóra hundinum noyðist ikki at goyggja sum lítla puddlinum fyri at fáa fólk at ræðast. Orðaskvaldur er orðið, eg hugsi um. Oddfríður nýtir tað um andaliga orðafloymin úr útvarpstólinum.

Stóð tað til mín, skuldu allar rásirnar stemplast fyri ljóðdálking. Mest fyri keðiligan tónleik og yvirvág av ringum tíðindum. ÚF hevur lyndi til at mála verðina kolsvarta við sjúku, deyða, harðskapi, misnýtslu og vanlukkum og torir ikki leggja afturat, at tað er syrgiligt, ella at okkurt má gerast. Í so máta kann Lindin kennast nærverandi.

Hvussu vit so plágast, eiga vit ikki at leggja alt undir at vera orðaskvaldur, sum troyttar okkum. Tí ikki alt er tað. Oddfríður undirbyggir uppáhaldið, at kristna prædikan er orðaskvaldur, við tí, at hon er grundað á retorikk. Eg velji at tulka tað soleiðis, at Oddfríður heldur talikynstur, tónalag og spæl við kenslur og hvørt av sínum vera álitið hjá teimum, sum bera kristna boðskapin fram, meðan tað er so sum so við tí sakliga. Her tori eg at halda upp á, at nógvar prædikur eru hildnar út frá veruligari sannføring og innlitið, og at tær eru forsvarligar bæði hvat viðvíkur orðamerkingum, tulking og útlegging.

At talað verður til kenslur, og at summi veruliga duga at røða, er í lagi, tá alt hitt er í lagi. Tað er tala hins høga.

Heldur ikki øllum kristnum fólki dámar kristiligt útvarp, men latið okkum ikki detta í ta grøvina at øsast, hvørjaferð okkurt rýkur av kristni. Vit eiga at virða talufrælsið, so nógv býtt enn kann sigast. Tú fert at bíta teg sjálvan í halan, grenjar tú ov nógv um, hvussu lágt støði er hjá øðrum. Har havi eg egnar royndir at vísa á.

Avslappað forhold

»Hví ikki hava eitt avslappað samband við trúnna?« stendur í greinini »Gud er deyður.« Hugsa vit um list, so spyrst tað besta sjáldan burtur úr hvílandi sálum, antin tað er heiðið ella kristið. Dylan syngur, »I've been all around the world, boys, trying to get to heaven before they close the door.« Viderø fór til enda jarðarinnar at finna skuggan av lovaða landinum. Tolstoj flýddi heimanífrá, tá hann var farin um tey áttati. Van Gogh skar oyrað av sær. Ingálvur av Reyni málaði í sjónvarpinum svart út yvir eitt motiv, sum onnur einans droyma um at mála, tí hann vildi ikki vera dogmatiskur. »We're restless souls,« segði Bono.

Er tað spurningur um lívið, so er tað ikki vist heldur, at svarið liggur í at taka tað lætt. The Dude í filminum The Big Lebowski, sum var í SvF herfyri, hevur eitt cool svar, sum kann røkka langt, men tað verður gelt, um ikki heitar kenslur búgva undir. At banka á himmaldyrnar kann gerast við guddómligum friði, men eitt gott lív hýsir eini dynamiskari blanding av hvílu og patos, bæði sum líðing og kenslusemi.

Deytt Gud-hugtak

Oddfríður Rasmussen sigur Gud vera deyðan, tí í Føroyum stendur so illa til við næstrakærleika og rættvísi. Vit eru fleiri, sum duga illa til hesi, og tað kann ikki umberast. Fyri tað kann Gud, um ikki vera deyður, so hava ilt fyri hjartanum.

Tað ber heldur ikki væl til at siga ímóti, tá Oddfríður sigur, at hugtakið Gud er relativt, tí kristin fólk duga so illa at semjast gudfrøðisliga. Høvundurin sigur, at hann velur at siga, at hugtakið Gud er relativt. Og sum hugtak er tað relativt sum onki annað, tí tað kann merkja næstan hvat tað skal vera.

Men at velja at siga, at »tað er ein spurningur um sjálvsøkni, hvørjum hami hetta hugtakið vísir seg í,« er sum at skjóta í myrkri. Tá er betri at tiga og lata tey tala, sum hava skil fyri viðurskiftunum. Onki bendir á, at tað altíð er so. Valið er ikki ein gandamegi, sum kann gera hvat sum helst til veruleika. Vit kundu eisini valt at sagt, at tað var ein spurningur um ødipuskompleks ella føroyska illveðrið. Men tað er eitt val, sum bara fyriheldur seg til valið og ikki veruleikan.

Velja vit at seta niður epli í september, so ber tað væl til, men gevur lítlan ávøkstur, tí soleiðis er náttúran hjá okkum. Logiska náttúran er, at eitt ting ikki passar, bara tí eg velji at siga tað.

Rákið, sum greinin Gud er deyður, tykist umboða, er vaksandi postmodernaða hugsanin, at alt er relativt. Bleyta relativismu hevur onkur nevnt tað. Hon sigur, at vit sjálv orða, hvat er rætt og skeivt, og alt tos um lívsvirði botnar í okkum sjálvum. Vil onkur svørja til hesar hugsanir, so biði eg hann rokna fylgjurnar fyrst. Og granska heidna sum kristna søgu áðrenn. Rákið er rímiliga nýtt, men hugsanin er gomul. Hon fær ikki staðið, tí tá sálin fer fallit, ber ikki til at taka í nakrastaðni. Alt er frammanundan dømt at verða flótandi, og tú sjálvur, sum vart kletturin, dettur sundur.

Vit eru skapningar, ikki gudar.

___

Tað er hent fyrr, at ervamenn í føroyskum listalívi hava kastað steinar eftir kristindómi. Henda greinin er ikki skrivað til tess at verja nakran, men bara fyri at vita, um tað bar til at avdúka ein bleikan krók í føroysku fólkasálini. Sumt í hesi grein datt uttan fyri eitt svar til Gud er deyður. Hetta skyldast millum annað, at tann greinin er ikki púra greið og er meiri merkt av einum dámi, enn nøkrum greiðum. Sum tá hundar goyggja. Vit vita nøkulunda, hvat teir royna at siga, men ikki púrasta.

Maria Guttesen, sum er á konsertferð í Danmark, hevur skipað Popdiva Network tiltakið, til tess at gera vart við tónleikin

Mynd: Jens Kr. Vang

MARIA GUTTESEN. Eftir at hon ikki hevur fløt seg fram tónlistarliga í longri tíð, ætlar Maria Guttesen nú at fáa sín tónleik út millum áhoyrarar í Danmark. Í hesum sambandi hevur hon saman við trimum øðrum skipað Popdiva Network, við tí fyri eygað, at sláa ígjøgnum innan danska tóleikaheimin, og higartil sær út til at tað rakar seymin á høvdið. Rúnar Reistrfup hevur hitt Mariu Guttesen á máli og tosað um aldrandi popdivair og ein tónleikaídnað, sum heldur vil dansa við teimum ungu

Føroysk popdiva vaknar úr dvala

TÓNLEIKUR

Rúnar Reistrup

Í fleiri ár hevur einki verið at hoyrt til Mariu Guttesen sum annars var rættiliga nógv frammi fyri nøkrum árum síðan. Størsti varðin á tónlistarligu yrkisleið hennara higartil, var útgávan av solofløguni »Where it all begins« í 1994, sum var, og enn er, sera væl umtókt í Føroyum.

Nú heldur Maria Guttesen sjálv, at hon hevur ligið í dvala nóg leingi, og síðstu mánaðirnar hevur hon brúkt til at fyrireika eitt innstig á danska tónleikapallin – eitt innstig, sum byrjaði farna vikuskiftið við einari konsert í Odense og einari í Aalborg og heldur fram við konsertum í Keypmannahavn og Århus, ið enda hesa lítlu konsertferðina ígjøgnum fýra teir størstu býirnar í Danmark.

Tríggjar sangarinnur

Men hon er ikki einsamøll um hesa royndina. Saman við tveimum donskum sangarinnum og einum sangskrivara hevur hon stovnað Popdiva Network – eitt framtak við tí fyri eyga at í fyrstu atløgu royna at vekja áhuga fyri teimum trimum sangarinnunum handan framtakið, og í øðrum lagi at hjálpa øðrum royndum og góðum, men ókendum, sangarinnum fram.

Eftir at hava fyrireikað Popdiva framtakið síðan í summar, varð hol sett á fyri góðari viku síðan við at senda eina nýinnspælda demofløgu til stóru donsku plátufeløgini, samstundis sum Maria og hinar báðar sangarinnurnar í felag høvdu konsertir á tveimum væl umtóktum spælistøðum í Odense og Aalborg. Nú koyrir tokið so, og í kvøld fara tær tríggjar popdivairnar á pall í Park Café í Keypmannahavn, og síðst í komandi mánað stendur Voxhall í Århus fyri tørni.

Tungt at dansa

Hvar leiðin hjá Mariu Guttesen gongur eftir lítlu konsertferðina, veldst um hvat úrslit spyrst burturúr framtakinum. Higartil hevur ligið væl fyri at sloppið at spælt á røttu støðunum og at vekja áhugan hjá donsku miðlunum, og tað boðar frá góðum. Onki vegurin fram í danska tónleikaídnaðinum er langur og tungur.

Danski tónleikaídnaðurin er ótrúliga tungur at dansa við, og tað ræður um at vera áhaldin, serliga tá man framførir mítt slag av tónleiki, sum ikki verður serliga høgt raðfestur av tónleikaídnaðinum, sigur Maria Guttesen.

Vaksin poppur

Maria Guttesen, ið nú bert førir seg fram við egnum løgum, kallar sjálv tónleik sín fyri »vaksnan« pop- og rocktónleik við einum dæmi av funk.

Hetta er eisini nøkunlunda tað slagið av tónleiki, sum hinar báðar sangarinnurnar, Julie Michelsen og Pia Trøjgaard, fáast við, og tær tríggjar dragast soleiðis allar við sama trupulleika í teirra felags royndum at koma fram.

Ætlanin er, at Popdiva Network skal vera eitt springbretti hjá teimum og øðrum ókendum sangarinnum innan tónleikagreinar, sum tónleikaídnaðurin ikki gevur so nógvan ans.

– Eg haldi at tónleikaídnaðurin her í Danmark fokuserar alt ov nógv uppá poptónleik fyri tey blaðungu. Fyri tann meira »vaksna« áhoyraraskaran er at kalla einki at fara eftir millum donsku fløguútgavurnar longur. Poptónleikurin fyri tey heilt ungu er sum oftast í so banalur og gevur ikki teimum á mínum aldri serliga nógv. Har er heilt einfalt eitt hol, sum treingist til at blíva fylt við kvalitetstónleiki til tann meira búna áhoyraran, og tað royna vit at gera vart við – ikki minst fyri tónleikaídnaðinum sjálvum, sigur Maria Guttesen og uppteknar harvið tað grundhugsjón, sum tær fýra kvinnurnar handan Popdiva Network hava til felags.

Leitar ikki eftir gulli

Maria droymir ikki longur um tað stóra gjøgnumbrotið og gull og grønar skógir innan tónleikaídnaðin.

– Eg eri ikki blaðung longur og satt at siga, so føli eg meg á ein hátt »ferdiga sum poppsangari« so at skilja, at eg ikki longur strembi eftir at blíva kend. Tað er ikki eitt mál hjá mær. Eg vil bara sleppa út við tí, um eg havi upp á hjartað.

Og tað hevur á sín hátt verið við til at skapt grundarlagið undir Popdiva Network.

– Vanliga er tað jú hørð kapping tónleikarar ímillum um í fyrstu atløgu at koma inn í tónleikaídnaðin og í aðru atløgu at gerast mest kendir og selja mest fløgur. Hendan kapping er ofta serliga hørð millum sangarar. Men Popdiva Network snýr seg um at leggja hetta stríð aftan fyri seg og ístaðin samstarva fyri at koma fram. Um nakar av okkum verður kend av hesum er í sær sjálvum ikki so umráðandi. Vit skulu bara út at vísa okkum fram, sigur Maria Guttesen, men viðgongur tó, at vónin um, at onkur innan tónleikaídnaðin fær eyguni upp fyri júst henni, sjálvsagt er til staðar.

– Men tað er ikki tann vónan, sum drívur verkið. Tað er vónin um at onkur av okkum, ella av teimum, sum seinni fara at brúka Popdiva konseptið, slær ígjøgnum, leggur hon afturat.

Einki framtak í Føroyum

Nú Maria Guttesen aftur ætlar sær fram innan tónleikin, fall Danmark sum tað nátúrliga valið at satsa uppá. Føroyar eru fyri henni ikki longur so áhugaverdar sum tónleikamarknaður, tí í royndum og veru er hon longu einaferð komin á leið so langt, sum tilber innan føroyskan tónleik. Tá hennara tónleikur var á hæddini í Føroyum mitt í hálvfemsunum var tað eingin trupulleiki at fylla Norðurlandahúsið til konsertir hennara, og fløgan taldist millum tær dygdarbestu og mest seldu.

Síðan tá hevur føroyski tónleikaheimurin ment seg, og talið á dygdargóðum tónleikaútgávum er vorðið nógv størri. Men Maria Guttesen kennir seg ikki freistaða at endurtaka tónleikaævintýrið í heimlandinum.

– Í Føroyum rennir tú teg rímiliga skjótt í eitt mark, har tú so at siga ikki kanst koma nógv longur. Og tað nyttar hvørki til ella frá at vera kendur í Føroyum, um tú ætlar tær á tónleikamarknaðir uttanlands. Tá mást tú allíkavæl byrja aftur heilt frá botni.

Skal uppdagast

Og í einum tónleikaídnaði sum tí danska merkir tað at byrja aftur við heilt øðrum arbeiðshátti.

– Skalt tú fram í Danmark, so ræður um at blívað »uppdagað«, sum tey kalla tað. Onkur skal leggja merki til tín, og ikki fyrr enn tá kemur tað upp á tal at útgeva eina fløgu ígjøgnum eitt av størru plátufeløgunum. Tað nyttar ikki bara at koma við einum demobandi og biðja eitt plátufelag lurta tað ígjøgnum. Tey fáa eina rúgvu av slíkum hvønn einasta dag og lata seg ikki imponera av tí.

Men áðrenn tað kann lata seg gera at blíva »funnin«, má ein vísa seg og á onkran hátt skilja seg út frá mongdini av kvalifiseraðum og dugnaligum tónleikarum.

– Tað eru so ótrúliga nógvir dugnaligir tónleikarar og góðir bólkar til í Danmark, at skalt tú gera tær vónir um at sláa ígjøgnum og koma upp á tal til ein plátusáttmála, so mást tú hava eina feita ide sum fangar – og vit royna so Popdiva konseptið, sigur Maria Guttesen, sum í summar endar sína útbúgving á Det Jydske Musikkonservatorium í Århus.

Á vevadressuni www.popdiva.dk ber til at fáa meira at vita um Popdiva Network hjá teimum fýra Julie Michelsen, Pia Trøjgaard, Lene Drachmann og Mariu Guttesen.